Gunnvá Dam

# Eg skrivi

*Skrivligt føroyskt til miðdeild*

2



Gunnvá Dam

# EG SKRIVI 2

*Skrivligt føroyskt til miðdeild*

*Myndir eftir Edward Fuglø*

NÁM

Gunnvá Dam
EG SKRIVI 2
Skrivligt føroyskt til miðdeild
Myndir: Edward Fuglø
Kápuuppseting: Grafik Studio
© 2004 Føroya Skúlabókagrunnur
Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent
2. útgáva 3. upplag 2015
Útgáva: Nám, Tórshavn 2015

ISBN 978-99918-0-353-1

Svanamerktur prentlutur 541 705

INNIHALD


Formæli ........ síða 5-6

**Dagdreymar** ........ síða 8-10

Fyrisøgn ........ síða 8

Uppgávur til fyrisøgn ........ síða 8-9

Samansett navnorð ........ síða 9-10

Krossorð ........ síða 10

**Ger eina plakat** ........ síða 11-15

Ger, fer, gerð og ferð ........ síða 11-12

Orðagáta ........ síða 12

Fyrisøgn ........ síða 13

Uppgávur til fyrisøgn – ljóðskifti og nútíðarendingar ........ síða 13-15

**Skrínið** ........ síða 16-20

Kenna navnorð, sagnorð og lýsingarorð ........ síða 16

Nútíðar- og tátíðarendingar á sagnorðum ........ síða 16-17

Fyrisøgn ........ síða 18

Uppgávur til fyrisøgn ........ síða 18-19

Navnorð, sagnorð ella lýsingarorð? ........ síða 19

Eyka uppgávur ........ síða 20

**At skriva brøv** ........ síða 21-25

Fyrisøgn – sernøvn ........ síða 21

Uppgávur til fyrisøgn ........ síða 22

Aðrar uppgávur um sernøvn ........ síða 22

Atlasuppgáva – sernøvn ........ síða 23

Fjald sernøvn ........ síða 23

Navnorð ella sernavn? ........ síða 24

Finn fjaldar bygdir ........ síða 25

**Um at skriva brøv** ........ síða 26-28

Fyrisøgn ........ síða 26

Uppgávur til fyrisøgn ........ síða 26-27

i ell y? ........ síða 27

Sagnorðauppgávur ........ síða 28

**Innihaldið í einum brævi** ........ síða 29-33

At seta punktum ........ síða 29

Sagnorð í nútíð og tátíð – og umsøgn og grundorð ........ síða 30-31

Finna umsøgn, grundorð og seta komma ........ síða 32

Kommaorð ........ síða 33

**Vit skriva brøv** ........ síða 34-37

Fyrisøgn ........ síða 34

Seta punktum ........ síða 34

Finna umsøgn, grundorð og seta komma ........ síða 34-35

Uppgávur til fyrisøgn ........ síða 36-37

**Brævbjálvin** ........ síða 38-39

At skriva uttan á brævbjálva ........ síða 38-39

**Ymisk brøv** ........ síða 40

Hugarok ........ síða 40

**Skrínið** ........ síða 41-45

Fyrisøgn ........ síða 41

Uppgávur til fyrisøgn – sernøvn ........ síða 42

Finna umsøgn, grundorð og seta komma ........ síða 43

At finna ávíst orð úr ávísum setningi ........ síða 44

Punktum ........ síða 44

Uppgávur til fyrisøgn ........ síða 45

Orðagáta ........ síða 45

Vegleiðing ........ síða 47

# Formæli

EG SKRIVI 2, við undirheitinum: *Skrivligt føroyskt til miðdeild*, er 2. bókin í røðini av rættskrivingar- og mállæruheftum til miðdeild fólkaskúlans. Mállæruheftini eru ikki ætlað ávísum floksstigi, men kunnu vegleiðandi nýtast úr 4. flokki upp í 7. flokk, so sum lærarin heldur vera hóskandi.

Væntandi verða eini 2-4 hefti árliga alt eftir, hvussu stór ið heftini verða, og nær ið byrjað verður í miðdeildini.

Í øllum mállæruheftunum verða mállæruuppgávur, fyrisagnir, uppgávur til fyrisagnir, aftursagnir og ymiskar stuttligar uppgávur.

Mállæran í EG SKRIVI 2 byggir á alt tað, sum næmingarnir lærdu í teirri fyrstu bókini.

Gjøgnum alla mállæruna havi eg lagt dent á at fáa næmingarnar at skilja tað, teir gera, heldur enn at teir t.d. benda eina ørgrynnu av orðum uttan at hugsa um, hví hesi orðini verða bend so ella so.

Í øllum bókunum eru partar, sum verða nevndir „Skrínið". Hesir partar taka saman um tað, ið næmingarnir áður hava arbeitt við, so til ber at fylgja við, um næmingarnir minnast tað, sum teir fyrr hava lært.

*Fyrisagnirnar eru gjørdar sum innskrivingarfyrisagnir á tvinnanda torleikastigum.* Men er onkur næmingur, ið er førur fyri at skriva fyrisøgnini sjálvur, ber sjálvandi til, at næmingurin skrivar fyrisøgnina í eitt skrivihefti. Summar fyrisagnir eru so mikið langar, at tær verða ikki skrivaðar í einum. Her veldst um hvønn einstakan lærara, um hann skrivar fyrisøgnina í tveimum, ella um hann heldur loypur okkurt um. *Gjørt verður vart við, at fyrisagnirnar, so sum tær eru ætlaðar at skriva á teimum báðum torleikastigunum, eru lagdar hjá í hesari útgávuni.*

Fyrireikandi uppgávur eru til allar fyrisagnir. Her eigur at verða lagdur stórur dentur á, at næmingarnir stava orðini rætt í sjálvari fyrireikingini.

EG SKRIVI umfatar ta mállæru og rættskriving, sum eftir leiðbeinandi lesiætlanini krevst til miðdeild fólkaskúlans.

Heftini eru býtt sundur í partar, ið hava somu heiti sum partarnir í teimum trimum „Kom og skriva"-bókunum. Hava næmingarnir arbeitt við hesum mállærubókum, sum nú verða givnar út, kunnu lærari og næmingar vera vísir í, at næmingarnir t.d. hava lært at finna umsøgn og grundorð og at seta komma og punktum, áðrenn teir verða bidnir um tað í „Kom og skriva"-bókunum.

Lat meg leggja dent á, so at eingin misskiljing skal vera, at tað ber væl til hjá øllum næmingunum at arbeiða við EG SKRIVI-heftunum, sama um teir brúka oman fyri nevndu bókarøðina ella ikki.

Hóskandi er, at 1-2 undirvísingartímar verða nýttir um vikuna, alt eftir hvussu langir partarnir eru, og um fyrisøgn ella aftursøgn er við í partinum. Til ber eisini at lata næmingarnar fyrireika fyrisøgnina heima við hús.

Tær stuttligu uppgávurnar – so sum krossorð, orðagátur, villiniborgir og uppgávurnar at finna villur – eru eykauppgávur. Nakrar eru beinleiðis knýttar at mállæruni, arbeitt verður við, aðrar ikki. Til ber tí at siga, at um næmingarnir ikki hava tíð at arbeiða við hesum uppgávum í skúlanum, kunnu teir gera tær lidnar heima við hús. Tó haldi eg, at næmingarnir eiga at sleppa at loysa hesar uppgávur í skúlanum eisini, kanska serliga tí, at hesar uppgávurnar eru øðrvísi.

Í innihaldsyvirlitinum ber til at síggja, hvørjum mállæruevnum arbeitt verður við í hvørjum einstøkum parti.

*Vegleiðing* er skrivað í hvørjum heftinum sær. Í vegleiðingini verður greitt frá, hvussu høvundurin hevur hugsað sær, at arbeiðast

kann við teimum ymisku síðunum, hvussu uppgávurnar kunnu loysast og í einstøkum førum, hví ið uppgávurnar eru júst soleiðis gjørdar og ikki øðrvísi.

Vónandi fara EG SKRIVI-heftini at stuðla og eggja næmingunum at kunna seg væl og virðiliga um tað føroyska málið, her undir føroyska málllæru og rættskriving, so at næmingunum fellur lætt og raðið at orðbera seg á góðum og tíðarbærum føroyskum máli, bæði í talu og í skrift.

*Høvundurin*



# Dagdreymar

Orðið ‚dagdreymar' er sett saman av tveimum navnorðum: ***dagur* og *dreymar*.**

*Samansett orð* eru *sett saman* av *tveimum orðum* ella *fleiri orðum*!

**Fyrisøgn**

Um summarið er tað altíð so stuttligt at spæla úti. Tað er so leingi ljóst hesi longu summarkvøldini, so vit sleppa at vera leingi úti. Í fjør summar spældu vit fótbólt langt út á kvøldini.

Vit høvdu gjørt tvey mál uttan fyri hoyggjhúsið hjá mammubeiggja. Eg var sum oftast málmaður. Tað dámdi mær væl. Onkuntíð skutu hini brotsspark. Tað var serliga stuttligt, tí eg bjargaði fleiri ferðir.

Onkuntíð spældu vit hondbólt, og eitt kvøldið fann Sanna uppá, at vit skuldu hava tvær spannir til mál, so at vit kundu spæla kurvabólt.

Eg helt ikki, at tað fór at rigga, men vit spældu kurvabólt í nógvar dagar.

Nú verður skjótt summar aftur, so eg gleði meg til aftur at spæla dystir. Kanska vit í ár fara at spæla eitt heilt annað bóltspæl.

Í fyrisøgnini eru *9 samansett orð*!

**Skriva tey her:**

| | |
|---|---|
| ____________________ | ____________________ |
| ____________________ | ____________________ |
| ____________________ | ____________________ |
| ____________________ | ____________________ |
| ____________________ | |

**Finn orð úr fyrisøgnini, sum eru *tað øvuta*!**

Skriva orðini tvær ferðir á tómu reglurnar!

| | | | |
|---|---|---|---|
| um veturin | ____________ | ____________ | (1) |
| stutt | ____________ | ____________ | (1) |
| illa | ____________ | ____________ | (5) |
| keðiligt | ____________ | ____________ | (6) |
| nætur | ____________ | ____________ | (10) |







**Kassaorð úr fyrisøgnini! – Set orðini á tey tómu støðini!**

stuttligt langt spældu leingi Um altíð ljóst fótbólt

________ summarið er tað ________ so ________ at spæla úti. Tað er so ________ ________ hesi longu summarkvøldini, so vit sleppa at vera leingi úti. Í fjør summar ________ vit ________ ________ út á kvøldini.

**Set orðini saman, so at orðini verða *eitt samansett orð*!**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| fjall | + | maður | = | ________ |
| dukka | + | vognur | = | ________ |
| last | + | bilur | = | ________ |
| súrepli | + | træ | = | ________ |
| hestur | + | vognur | = | ________ |
| hundur | + | hús | = | ________ |
| grýta | + | lok | = | ________ |
| pera | + | træ | = | ________ |
| rotta | + | hali | = | ________ |
| ísur | + | bilur | = | ________ |
| kurv | + | bóltur | = | ________ |





**Skriva samansettu orðini í talvuna í bókstavarað!**





Set bókstavirnar í gráu puntunum saman: ______________________

**Krossorðagáta!**




(á steinum í fjøruni)






# Ger eina plakat

**Frágreiðing:**
Orðini *ger* **og** *fer* **eru** *sagnorð*. **Seta vit** *at* **framman fyri hesi sagnorðini, fáa vit** *navnháttin:* *at gera* **og** *at fara*.
*Sagnorð* vísa ofta eina *rørslu* ella eina *hending*.
Vit hava eisini orðini *gerð* og *ferð*. Tey orðini eru *navnorð*. Vit kunnu siga *ein gerð* og *ein ferð*.

*Navnorð* siga vit *ein* ella *eitt* um. Vit kunnu eisini siga *fleiri*, so standa navnorðini í fleirtali. *Navnorð* eru býtt sundur í *trý kyn*: *kallkyn*, *kvennkyn* og *hvørkikyn*. Gev tær far um, at *sagnorðið* ‚ger' verður skriva við ongum ð, men einsljóðandi *navnorðið* verður skrivað við ð, (ein góð/ring) gerð!

**Er orðið við strikuni undir *sagnorð* ella *navnorð*? – Set ring um tað rætta!**

| | **Sagnorð** | **Navnorð** |
|---|---|---|
| Hon ger eina mynd | i | u |
| Tað var ein góð gerð | s | ð |
| Hann ger altíð ónáðir | d | ð |
| Hatta var ein ljót gerð | u | r |
| Hann fer í skúla | r | k |
| Hon fer eftir kettuni | ø | k |
| Vit høvdu eina góða ferð | k | e |
| Hatta var alt, vit høvdu hesa ferð | a | f |
| Mamma fer í bindiklubb | j | u |
| Omma ger bollar | g | r |

Set bókstavirnar saman, har tú setti O við sagnorð: ____________________

Set bókstavirnar saman, har tú setti O við navnorð: ____________________

**Gev gætur:** *tú skalt stava úr neðra og uppeftir!*



**Set *ger*, *fer*, *gerð* ella *ferð* rætt í tey tómu plássini!**

Símun ______________ skúlating. Hann ______________ ikki í song, fyrr enn hann hevur gjørt tey. Eina ______________ gloymdi hann at rokna, so hann fór upp mitt um náttina at rokna. Mamman helt, at hetta var ein býtt ______________, tí hann orkaði ikki upp um morgunin. Tað kom ______________ á hann, tá hann sá, at klokkan var næstan átta. Hann hugsaði, at næstu ______________, hann gloymdi at rokna, mátti hann gera tað um morgunin.

Mamma Símun ______________ altíð tíðliga upp, men hesa ______________ hevði hon sett klokkuna inn til Símun, so hann skuldi sjálvur kenna, at tað var ein býtt ______________ ikki at sova um náttina.

Nú ______________ Símun seg lidnan, áðrenn hann ______________ í song. Hann minnist altíð ta ______________ina, tá hann forsvav seg. Tað má ikki henda eina ______________ afturat.



**Krossgáta!**

1(n): árstíð 1(t): blóma 2: árstíð og gentunavn
3: høgtíð 4: fuglur 5: Norðurland
6: høvuðsstaður í Føroyum







## Fyrisøgn

Hanna ger seg til at fara í skúla. Hon eigur at møta klokkan átta, og nú er klokkan næstan átta. Hon leggur bøkurnar í taskuna, mussar mammu sína og pápa sín og fer av stað. Hanna býr tætt við skúlan, men í dag noyðist hon at renna. Hon rennur so skjótt, at hon sær ikki bilin, sum kemur koyrandi við rúkandi ferð.

Bilførarin sær Honnu og fer uttan um hana, men hann koyrir so mikið skjótt, at hann missir tamarhaldið á bilinum og rennir beint á ein annan bil.

Hanna fer yvir til bilarnar báðar. Hon er bæði bangin og kløkk, men ger av ikki at fara, tí hon veit, at tað er skeivt at rýma.

Bilførarin, sum koyrdi við tí rúkandi ferðini, hevur ongan skaða fingið, men hin sær út til at hava meiðslað sær armin.

Tíbetur er fartelefon í bilinum. Hanna ringir 112, sum hon hevur lært, at hon skal gera, um okkurt óhapp er.

Sjúkrabilurin kemur eina løtu seinni. Bilførarin fer á sjúkrahúsið, men hin gongur og gremur seg um hesa býttu gerð, sum hann hevur gjørt.

Finn í fyrisøgnini 3 *sagnorð*, sum standa í *nútíð* og enda við *-ir*.
Tey standa á 6., 7. (tað fyrra sagnorðið á regluni) og 13. reglu.

**Bend hesi *sagnorð* í *navnhátti, nútíð* og *tátíð*!**

| Navnháttur | Nútíð | Tátíð |
|---|---|---|
| at | hann | hann |
| | hon | hon |
| | tað | tað |



**Frágreiðing:**

*Sagnorð*, sum enda við *-ti* ella *-di í tátíð*, enda sum oftast við *-ir í nútíð*!
*Sagnorð*, har *sjálvljóðið/tvíljóðið í stovninum broytist* frá navnhátti *til tátíð*, enda við *-ur í nútíð*!
Dømi: at gremja (navnháttur) – hann gramdi (tátíð). *Sjálvljóðið* er *broytt* frá e til a.
*Nútíðarendingin* verður so *-ur*: hann grem*ur*.

**Sjálvljóðini/tvíljóðini eru hesi:**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| a | á | e | i | í | o | ó | u |
| ú | y | ý | æ | ø | | | |
| ei | ey | oy | | | | | |

**Set prikk undir sjálvljóðini/tvíljóðini í hesum sagnorðum:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| gremja | koyra | missa | eiga |
| ringja | henda | flenna | sita |

**Hvussu eita somu orð í tátíð?**

______________ ______________ ______________ ______________

______________ ______________ ______________ ______________

**Set prikk undir sjálvljóðini!**

Hava summi orð broytt sjálvljóðið / tvíljóðið í stovninum frá navnhátti til tátíð.
Um so er – hvørji?

____________________ ____________________ ____________________




**Bend orðini frammanfyri í *navnhátti, nútíð* og *tátíð*!**

| Navnháttur | Nútíð | Tátíð |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |

**Frágreiðing:**

*Sagnorð*, sum hava *onga ending í tátíð*, enda við *-ur í nútíð*!

**Bend hesi *sagnorð í navnhátti, nútíð* og *tátíð*: *renna, koma* og *ganga*!**

| Navnháttur | Nútíð | Tátíð |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |

Finn orð í fyrisøgnini, sum *týða tað sama* sum hesi orðini! Skriva orðið tvær ferðir á tómu reglurnar. Minst til at stava orðið rætt!

| | | | |
|---|---|---|---|
| kyssir | ________ | ________ | (3) |
| móður | ________ | ________ | (3) |
| faðir | ________ | ________ | (3) |
| nærindis | ________ | ________ | (3) |
| má | ________ | ________ | (4) |
| fær eyga á | ________ | ________ | (5) |
| óttafull | ________ | ________ | (9) |
| stinga av | ________ | ________ | (10) |
| fullari | ________ | ________ | (11) |
| vanlukka | ________ | ________ | (14) |
| tápuligu | ________ | ________ | (16) |



# Skrínið

Í skríninum fara vit at taka saman um tað, vit hava lært í hesum partinum.

Vit hava arbeitt við:

- ***sagnorðum* í *navnhátti, nútíð, tátíð* – og at finna *stovnin í orðunum.***
- *tátíðarendingunum: -ti, -di, -ði, -aði og ongari ending.*
- nútíðarendingunum: *-ar, -ir* og *-ur*.
- at *kenna mun* á *navnorðum, sagnorðum* og *lýsingarorðum.*
- *samansettum orðum.*
- *sagnorðunum ger* og *fer* og *navnorðunum gerð* og *ferð.*
- *a* ella *æ.*
- *fyrisagnum, aftursagnum* og *lyklaorðum.*

**Být orðini í skríninum sundur í teir tríggjar *orðaflokkarnar: navnorð, sagnorð* og *lýsingarorð*!**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| bátur | svimja | lærari | stórur | arga | vár | stuttur |
| lítið | fletta | gera | breið | vinur | royta | |

Skriva *navnorðini* her: ____________________

Skriva *sagnorðini* her: ____________________

Skriva *lýsingarorðini* her: ____________________

**Hvussu eita *sagnorðini* í skríninum í *navnhátti* og *tátíð*?**

| Navnháttur | Tátíð |
|---|---|
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |

**Skriva *sagnorðini í tátíð* her:**

Tey, sum enda við *-ti*: ______________________

*-di*: ______________________

*-aði*: ______________________

*onga ending*: ______________________

**Frágreiðing:**

*Sagnorð*, sum enda við *-ti* ella *-di í tátíð*, enda ofta við *-ir í nútíð*.
*Sagnorð*, sum hava *onga ending í tátíð*, enda við *-ur í nútíð*.
*Sagnorð*, sum enda við *-aði í tátíð*, enda við *-ar í nútíð*.

**Set *sagnorðini* í klombrum á tey tómu plássini. Men orðini skulu fyrst broytast, so at tey *standa í nútíð*. Minst til *nútíðarendingarnar*!**

Drongurin ____________ hvønn hósdag í skúlanum. (svimja)

Hanna ____________ ofta systur sína. (arga)

Dávur ____________ altíð hinar dreingirnar. (royta)

Flogfarið ____________ sum oftast rættstundis. (lenda)

Lærarin ____________ bøkurnar út. (býta)

Sanna ____________ altíð, tá ið hon skundar sær. (detta)

Pápi ____________ fyri bóndan. (fletta)

Omma ____________ ommubørnunum hosur. (binda)

Abbi ____________ pípu. (roykja)

Pápi ____________ bussin hjá Bygdaleiðum. (koyra)

Bóndin ____________ fjósið. (sópa)

Lærarin ____________ navnorð við børnunum í dag. (benda)

Hvønn morgun ____________ beiggi mín 5 kilometrar. (renna)

Hann ____________ altíð, tá ið onkur ikki orkar. (flenna)

Pætur ____________ so stillur í skúlanum. (sita)

Mamma ____________ pungin upp úr taskuni. (taka)

Vøran ____________ 150 krónur. (kósta)

Mamma ____________ keypmanninum peningin. (geva)

## Fyrisøgn

Janus fer til Havnar við bussinum. Janus keypir sær ofta fløgur, og tí dámar honum væl at fara til handils. Hann ger sær altíð ørindi inn í fløguhandilin, tí at har eru bæði fløgur og telduspøl at fáa.

Í dag lurtar hann eftir ymiskum tónleiki og spælir eitt telduspæl, áðrenn hann ger av at keypa sær eina fløgu. Hesa ferð keypir hann sær eina dupulta fløgu, men hon er dýr. Janus kennir væl bólkin, sum spælir, og vónar, at fløgan er góð. Annars hevur hann gjørt eina býtta gerð.

Aftaná fer Janus í matarhøllina. Har drekkur hann eina kola og etur tvær pylsur.

Tá ið hann er liðugur, rennur hann yvir til busssteðgistaðið. Bussurin kemur í somu løtu, og glaður er Janus, at hann skundaði sær.

**Skriva 3 *sagnorð* omanfyri, sum enda við *-ir*. Tey eru á 1., 4. og 6. reglu!**

__________ __________ __________

**Skriva 3 *sagnorð* omanfyri, sum enda við *-ar*. Tey eru á 2., 4. og 7. reglu!**

__________ __________ __________

**Skriva 4 *sagnorð*, sum enda við *-ur*. Tey standa á 9., 11. og 12. reglu!**

__________ __________ __________ __________

**Finn orð í fyrisøgnini, sum eru *tað øvuta* og skriva tey tvær ferðir!**

| | | | |
|---|---|---|---|
| selur | __________ | __________ | (1) |
| sjáldan | __________ | __________ | (1) |
| aldri | __________ | __________ | (2) |
| hvørki ella | __________ | __________ | (3) |
| í gjár | __________ | __________ | (4) |
| selja | __________ | __________ | (5) |
| einkulta | __________ | __________ | (6) |
| illa | __________ | __________ | (6) |
| ring | __________ | __________ | (7) |
| áðrenn | __________ | __________ | (9) |
| keddur | __________ | __________ | (12) |

## Kassaorð

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| væl | ferð | telduspæl | sær | góð | keypir | dag |
| gerð | fløgu | spælir | eftir | dýr | gjørt | ger |

**Set kassaorðini rætt á tey tómu støðini. Tú kanst eisini hyggja í fyrisøgnina. – Minst til at stava orðini rætt!**

Í _____________ lurtar hann _____________ ymiskum tónleiki og _____________ eitt _____________, áðrenn hann _____________ av at keypa _____________ eina _____________. Hesa _____________ _____________ hann sær eina dupulta fløgu, men hon er _____________. Janus kennir _____________ bólkin og vónar, at fløgan er _____________. Annars hevur hann _____________ eina býtta _____________.

**Er orðið navnorð, sagnorð ella lýsingarorð? – Set O við tað rætta!**

| | Navnorð | Sagnorð | Lýsingarorð |
|---|---|---|---|
| fløgur | ð | p | s |
| gerð | i | a | a |
| býtt | t | r | ð |
| keypir | u | s | l |
| etur | t | a | i |
| kola | n | t | p |
| glaður | r | s | ó |
| ørindi | í | a | t |
| fer | o | g | r |
| bussur | r | i | a |
| ger | s | n | s |
| kennir | k | o | g |
| telduspæl | k | t | i |
| góð | i | f | g |
| drekkur | s | r | g |
| pylsur | s | i | a |
| spælir | t | ð | t |

Set bókstavirnar rætt saman, har tú setti O við navnorð: ________________

sagnorð: ________________ og lýsingarorð: ________________

**Gev gætur:** *tú skalt stava úr neðra og uppeftir!*

**Hvussu eita hesir tríggir dreingirnir?**

**Les tekstin og fá skil á, hvussu dreingirnir eita!**

Pætur er størri enn Óli. Óli er ljóshærdur. Bárður er eisini størri enn Óli. Bárður hevur brillur. Óli er í strípútari blusu. Pætur er minni enn Bárður. Bárður hevur longri hár enn Óli.



1. drongur eitur: ____________

2. drongur eitur: ____________

3. drongur eitur: ____________

**Orðagáta!**




**Set inn í „urið“, so sum tølini vísa. Finn so loysunarorðið frá 1 - 10!**

1 - 4: tendrast og sløkkist
4 - 6: norðurlendskt flogfelag
5 - 8: gentunavn
7 - 9: ovast á einum húsum
6 - 10: hin einsamalli
1 - 10: ein lutur, tú setur ein annan lut niðurí!



# At skriva brøv

## Sernøvn

**Frágreiðing:**

**Øll *sernøvn* verða skrivað *við stórum*. Bæði staðanøvn (t.e. nøvn á bygd, býi, landi, havi, fjalli o.ø.), fólkanøvn , djóra(keli)nøvn og skipanøvn. Vanlig *navnorð*, sum kráka, hundur, toskur og ketta, verða *ikki* skrivað *við stórum*, tí hetta eru *felagsheitini* hjá hesum djórasløgunum og ikki sernøvn.**

**Fyrisøgn**

Klaksvík, 3. mars 2_____

Góði Høgnar!

Takk fyri brævið, eg fekk frá tær. Í gjár var eg við flokkinum ein túr í Kirkjubø. Vit fóru við Bygdaleiðum kl. 8.00 gjøgnum undirsjóvartunnilin til Leirvíkar, og so fóru vit til Havnar. Vit steðgaðu í Havn í tveir tímar, har vit vóru í Norðurlandahúsinum. Vit fóru til Kirkjubøar kl. 12.00. Vit koyrdu fram við Vesturkirkjuni. Tað er ein vøkur kirkja.

Á veg til Kirkjubøar koyrdu vit fram við Norðasta Horni og Velbastað. Á Velbastað sóu vit yvir á Hest og Koltur. Oyggjarnar vóru so vakrar í góðveðrinum.

Bussurin steðgaði á Gomluræ tt, har nøkur ferðafólk fóru av. Tey skuldu til Sandoyar við Teistanum.

Í Kirkjubø vóru vit í Ólavskirkjuni, Múrinum og Roykstovuni, og ein maður úr Kirkjubø greiddi okkum frá hesum støðunum. Eisini segði hann okkum søguna um Gæsu og um Sverra kong.

Hetta var ein frálíkur túrur. Vit vóru aftur á Klaksvík kl. 20.00.

Blíðar heilsanir
Beinta



**Skriva øll sernøvnini úr fyrisøgnini her:**

**Skriva sernøvn við hesum bókstøvum:**

| | genta | drongur | bygd | býur | skip | land |
|---|---|---|---|---|---|---|
| A | | | | | | |
| S | | | | | | |
| H | | | | | | |
| G | | | | | | |
| R | | | | | | |

**Tú fært tveir minuttir til hesa uppgávuna!**

Skriva so nógv *sernøvn* sum gjørligt, ið byrja við **S**!



**Til hesa uppgávuna brúkar tú Atlasið!**

Tú ferðast úr Klaksvík til Havnar.
Hvørjum bygdum koyrir tú framvið, áðrenn tú ert í Havn?

**Skriva *bygdirnar* her:**

**Hvussu eita tær tríggjar *oyggjarnar*, tú hevur verið á henda dagin?**

**Finn *fjald sernøvn*!**
Fyrsti bókstavur er skrivaður við stórum!

| | | | |
|---|---|---|---|
| al*Ó*rvu | ni*L*a | atiu*D*r | ir*K*á |
| am*S*le | v*L*í | lr*K*a | nl*E*i |
| sig*V*dí | as*J*nu | íu*S*mn | nna*A* |
| arn*K*ti | nai*K*r | ru*T*ði | n*U*n |

**Skriva *sernøvnini* her:**

**Er orðið vanligt *navnorð* ella *sernavn*?**



**Set ring um bókstavin undir tí rætta svarinum!**

| | Sernavn | Navnorð |
|---|---|---|
| Eg var í RUNAVÍK í gjár. | l | ø |
| Har sá eg eitt ROSS. | g | s |
| Í Runavík sá eg nógv HÚS. | b | l |
| Eg møtti SÁRU. | e | t |
| Hon átti eitt lítið BARN. | r | e |
| Barnið átti eina DUKKU. | h | i |
| Hon æt LINDA. | i | a |
| Omma mín býr í KLAKSVÍK. | r | l |
| Henni dámar væl DJÓR. | e | k |
| Hon eigur nógvan SEYÐ. | v | i |
| Ein ær eitur SVARTA. | v | s |
| Tað er ein svørt ÆR. | i | s |
| OMMA er fitt. | í | n |
| Eg fari oman á KEIINA at fiska. | l | e |
| Har eru nógvir BÁTAR. | j | i |
| DÚGVAN plagdi at liggja har. | í | p |
| Hon flutti FERÐAFÓLK. | t | s |
| Hon sigldi millum LEIRVÍK og Klaksvík | k | h |

Set saman bókstavirnar, sum tú setti ring um!

Sernavn: ______________________________ Navnorð: ______________________________



**Finn fjaldar bygdir og skriva tær niðanfyri í bókstavarað!**

| | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| F | U | G | L | A | F | J | Ø | R | Đ | U | R | L | N |
| U | D | H | O | V | K | I | R | K | J | A | S | A | O |
| N | H | Ú | S | A | R | S | A | N | D | U | R | I | R |
| N | A | S | U | R | F | I | V | E | S | F | O | T | Đ |
| I | L | A | M | G | G | H | Í | I | V | S | B | O | R |
| N | D | V | B | I | K | Ó | K | Đ | Í | G | Ø | F | A |
| G | Ó | Í | A | R | D | S | K | I | N | O | U | T | G |
| U | R | K | S | N | T | V | Ø | R | O | Y | R | I | Ø |
| R | S | A | N | D | V | Í | K | A | Y | R | L | R | T |
| H | V | A | L | V | Í | K | E | G | L | A | M | B | A |
| S | Í | O | D | Y | L | V | Á | G | U | R | D | A | L |
| S | K | I | P | A | N | E | S | G | J | Ó | G | V | V |

A: ____________________

B: ____________________

E: ____________________

F: ____________________

F: ____________________

G: ____________________

H: ____________________

H: ____________________

H: ____________________

H: ____________________

H: ____________________

H: ____________________

K: ____________________

L: ____________________

N: ____________________

O: ____________________

S: ____________________

S: ____________________

S: ____________________

S: ____________________

S: ____________________

T: ____________________

T: ____________________

V: ____________________

Ø: ____________________



# Um at skriva brøv



**Fyrisøgn**

Vík, 12. mai 2_____

Góða Hanna! 1

Nú fari eg at skriva tær eitt brævx, men fyrst fari eg at takka tær fyri 2
kortið, eg fekk frá tær, tá eg fylti. Eg var so glað fyri tað. 3
Nógv børn komu yvir til mín at ynskja mær til lukku. Meðan vit 4
sótu til borðs, fór Anna, vinkona mín, at syngja „Til lukku 5
í dag," og øll tóku undir við henni. 6
Tá ið vit høvdu etið, fóru vit at hyggja at einum filmi, sum systir 7
mín hevði lænt. Hann var góður. Vit spældu eisini eitt spæl og 8
runnu eftir postum. 9
Føðingardagurin var liðugur klokkan átta. Tá fóru øll til hús. Bygdin 10
er so lítil, at øll gingu til hús, men eg fylgdi Maritu til teirra, tí at 11
hon tordi so illa at ganga einsamøll. 12
Nú veit eg ikki meira. Skriva skjótt aftur. 13

Kærar heilsanir 14
Ása 15

**Finn orð úr fyrisøgnini, sum eru tað *øvuta!***

Skriva orðini tvær ferðir. Minst til at stava tey rætt!

seinast ____________ ____________ (2)

tók ____________ ____________ (3)

kedd ____________ ____________ (3)

beiggi ____________ ____________ (7)

ringur ____________ ____________ (8)

stór ____________ ____________ (11)

væl ____________ ____________ (12)

seint ____________ ____________ (13)

# POSTUR

**Set kassaorðini rætt á tær tómu reglurnar!**
Minst til at stava orðini rætt!

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| hevði | mín | Til lukku | sótu | fóru | hyggja |
| borðs | systir | fór | høvdu | einum | syngja |

Meðan vit ______________ til ______________, ______________ Anna, vinkona ______________ at ______________ „______ ______________ í dag". Tá ið vit ______________ etið, ______________ vit at ______________ at ______________ filmi, sum ______________ mín ______________ lænt.

**Verður orðið skriva** *við i* ella *y*? – Set O!
**Øll orðini standa í *Orðaskyni*!**

| | i | y | **Skriva orðið** |
|---|---|---|---|
| Eg f_lli í dag | k | n | |
| Mær dámar væl at f_ska | u | t | |
| Eg komi _vir til tykkara | r | g | |
| Hann _nskti mær til lukku | u | ø | |
| Øll søgdu t_l lukku | k | a | |
| Eg var f_rstur í føðingardag | g | s | |
| Vit sóu ein f_lm | k | k | |
| S_stir mín er fitt | a | i | |
| Hon er _kki her | u | s | |
| B_gdin er lítil | t | r | |
| Eg skr_vi ofta brøv | l | o | |
| Eg takkaði f_ri | p | y | |
| Eg havi f_ngið eitt ur | l | t | |
| Hann er st_llur | i | y | |
| Hon er f_tt | t | r | |
| Eg komi yvir til t_kkara | e | f | |

Set bókastavirnar saman, har sum tú setti **O** við *i*: ______________

Set bókstavirnar saman, har sum tú setti **O** við *y*: ______________



**Frágreiðing:**
*Sagnorð* eru orð, sum siga frá eini *hending* ella eini *rørslu*!

Tú fært 2 minuttir til hvørja av hesum trimum uppgávunum!

**Skriva so nógv *sagnorð* sum gjørligt, sum tú kanst *gera við hondunum*!**
Dømi: *skrivi*

**Skriva *sagnorð*, sum *tú gert við beinunum*!**
Dømi: *sparki*

**Skriva *sagnorð*, sum tú *gert við munninum*!**
Dømi: *spýti*





# Innihaldið í einum brævi

**Frágreiðing:**

Tá ið tú skrivar brøv ella annan tekst, hevur nógv at siga, at tú setur ***punktum* og *komma* í tekstin.**
Ein tekstur við ongum punktum er sera torførur at lesa.
Punktum setur tú í tekstin, tá ið tú ert liðug/ur at siga okkurt. Punktum skilur tveir setningar.
Tú setur bara *punktum*, um setningurin gevur *fullgóða meining* – ella *um setningurin kann standa einsamallur*.

**Set punktum í tekstin og rætta til stóran bókstav eftir punktum!**

10 punktum skulu vera í brævinum!

Tórshavn, 1. apríl 2____

Góða Beinta

Takk fyri brævið tað var stuttligt at hoyra frá tær tú hevur havt ein góðan túr í Kirkjubø eg hevði ynskt at sloppið hagar í fjør summar vóru vit í Húsavík vit gjørdu ymsar útferðir ein av døgunum vóru vit í Dali og ein á Sandi vit spældu í nógvar tímar á tí bleyta sandinum tað var sera stuttligt kanska komi eg at vitja teg í summar

Kærar heilsanir
Høgnar

**Skriva orðini framman fyri punktum í talvuna niðanfyri!**






Set saman bókstavirnar frá 1 - 12! ______________________________



**Frágreiðing:**

Tað er lættari at seta komma í ein tekst, tá ið tú dugir at finna *umsøgn* og *grundorð*.
*Umsøgnin* er eitt *sagnorð*, sum stendur í *nútíð* ella *tátíð*.
*Grundorðið* er eitt *navnorð* ella eitt orð, ið stendur *í staðin fyri navnorð*. *Grundorðið* er tann, ið *fremur sagnorðið*.
Tá ið tú hevur funnið umsøgnina, finnur tú *grundorðið* av at spyrja *hvør*!

Dømi:
‚Pætur skrivar' – *skrivar* er *sagnorð* í nútíð og er tí *umsøgn* í setninginum.
Tú kanst so spyrja: *Hvør* skrivar? – Svarið er: *Pætur*! *Pætur* er *grundorð* í setninginum.

**Er orðið niðanfyri *sagnorð í nútíð ella tátíð* – ella *ikki*?**

Set x við ja ella nei!

| | ja | nei | |
|---|---|---|---|
| bukaði | | | r |
| kona | | | a |
| rennur | | | e |
| svav | | | y |
| høgur | | | s |
| lá | | | p |
| regnaði | | | a |
| blíður | | | l |
| drekkur | | | r |

Set saman bókstavirnar, har tú svaraði ja: ______________________





**Vit seta hesi tekn undir umsøgn og grundorð:**
*Umsøgn: o* *Grundorð: x*

Minst til, at hesi bæði orðini eru *eisini sagnorð*:
*at hava* og *at vera* – og tey eru *umsagnir*, tá ið tey standa *í nútíð og tátíð*!

**Set *umsøgn* og *grundorð* í hesum setningum!**

1. Maðurin koyrdi bilin.
2. Konan kókaði døgurða.
3. Gentan át breyð.
4. Gjørdi drongurin matin?
5. Húsið var gult.
6. Sóljan er gul.
7. Eigur drongurin bátin?
8. Gentan hoppar um band.
9. Drongurin spælir lego.
10. Mamma seymar klæði.
11. Abbi fiskar.
12. Haraldur fer í skúla.

**Frágreiðing:**
Ein setningur kann eisini hava *tvær umsagnir* og *eitt grundorð*!

Dømi:
Linda sat og seymaði klæði.
*Bæði sat og seymaði* eru *umsagnir*. *Linda* er *grundorð*.



**Set *umsagnir* og *grundorð*!**

1. Gentan situr og skrivar bræv.
2. Drongurin stendur og fiskar síl.
3. Maðurin liggur og svevur.
4. Pápin ruddar og vaskar í dag.
5. Hundurin stendur og goyr.
6. Atli situr og roknar.





**Frágreiðing:**
Ein setningur kann eisini hava *eina umsøgn* og *tvey grundorð*!

Dømi:
Hanus og Janus svumu á sjónum.
*Svumu* er *umsøgn*. Bæði *Hanus* og *Janus* svumu, so báðir eru *grundorð*.

**Set *umsøgn* og *grundorð* í hesum setningum:**

1. Gentan og drongurin fiska síl.
2. Ryssa og fyl standa á bønum.
3. Konan og maðurin hyggja í sjónvarp.
4. Hønan og hanin pikka korn.
5. Omma og abbi ganga túr.
6. Snar og Flekk berjast.
7. Lív og Vár hoppa um band.
8. Pól og Jón renna um kapp.
9. Símun og Hanna eta breyð.
10. Hønurnar og dunnurnar verpa.

**Frágreiðing:**
*Ein setningur* hevur næstan altíð eina *umsøgn* og sum oftast eisini eitt *grundorð*. Tú setur komma í ein tekst, tá ið tú hevur umsøgn og grundorð, sum hoyra saman, og so aftur finnur eina aðra umsøgn, sum hoyrir saman við einum øðrum grundorði.



Dømi:
Rósa rennur og Pætur flennir.

*Rennur* er *umsøgn* – *Rósa* er *grundorð*.
*Flennir* er eisini *umsøgn*, men her er *Pætur grundorð*.

Her má eitt komma vera, tí at her eru tveir sjálvstøðugir setningar.
Her seta vit komma framman fyri *og:* Rósa rennur, og Pætur flennir.







**Frágreiðing:**

Komma verður *ofta* sett framman fyri hesi orð:

men, meðan, tí (at), av tí (at), tá ið, tá, um, so (at), soleiðis (at),
fyrr enn, áðrenn, uttan (at), hvør (ið), hvat (ið), hví (ið), hvussu (ið),
*ið*, tá ið tað merkir *sum*
*sum*, tá ið tað merkir *ið*
*at*, um *navnháttur ikki kemur aftaná*
*og*, um *tað ikki er ein uppreksan*

**Finn *umsøgn* og *grundorð* í hesum setningum og *set komma*!**

1. Petur vaskar bil.
2. Omma bindur hosur og abbi roykir pípu.
3. Flekk goyr tá ið postmaðurin kemur.
4. Eg vaskaði frakkan sum beiggi keypti í gjár.
5. Sólvá vaskar upp og Teitur turkar av.

**Set orðið framman fyri komma inn í talvuna!**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | 3 | | | | |
| | 2 | | | | | |
| | 5 | | | | | |
| 4 | | | | | | |

Set bókstavirnar frá 1 - 5 saman: ____________________



# Vit skriva brøv

**Fyrisøgn**

Fuglafirði, 20. mai 2_____

Góða Ása!

Fyrst takki eg tær fyri brævið sum eg fekk frá tær tað var stuttligt at hoyra at tú hevði ein góðan føðingardag í morgin fara øll børnini í 5. flokki í Fuglafjarðar skúla útferð vit ætla okkum niðan á Trælavatn fyrst koyra vit við bussi út á Kambsdal og síðan ganga vit niðan til vatnið eg havi eina ferð verið har men tað er so langt síðan at eg minnist tað ikki so væl nú veit eg einki meira at siga tær eg gleði meg at hoyra frá tær






kærar heilsanir

Hanna

**Hjálp Honnu at seta punktum í brævið!**

Tú skalt seta 8 punktum. Minst til, at fyrsti bókstavur eftir punktum verður skrivaður við stórum!





**Minst til:**

- at *sagnorð* eru orð, sum siga frá eini *hending* ella *rørslu*
- at *sagnorð* verða bend *í tíðum* – nútíð og tátíð
- at *nútíð* fer fram *í løtuni*, men *tátíð er farin* fram
- at tú kanst seta *at framman fyri eitt sagnorð*. Tá fær sagnorðið endingina -*a* (*at* gang*a*, *at* renn*a*, *at* stand*a*...)

**Set *striku undir* øll *sagnorðini* í brævinum, sum standa *í nútíð* og *tátíð*!**
Sagnorðini í nútíð og tátíð eru *á hesum reglum*:
3 á 2. reglu, 2 á 3. reglu, 1 á 4. reglu, 2 á 5. reglu, 2 á 6. reglu og 3 á 7. reglu.

**Finn so *umsøgn (o)* og *grundorð (x)*!**
*Umsøgnin* er *sagnorð* í *nútíð* ella *tátíð* – hana hevur tú longu strikað undir!
*Grundorðið* finnur tú av at spyrja *hvør*!



**Set *komma* í brævið!**
Minst til tey vanligastu kommaorðini:
men, meðan, tá ið, hóast, hvør (ið), hví (ið), hvussu (ið), hvønn (ið), um, so (at), tí (at), uttan (at), áðrenn, fyrr enn,
*ið – sum*, tá ið tað merkir *tað sama*,
*og*, tá ið *tað ikki er ein uppreksan*,
*at*, um *navnháttur ikki kemur aftaná*.





**Set orðini rætt saman og skriva tey á regluna! Hetta eru orð úr fyrisøgnini.**

**Minst til at skriva tey rætt!**

| | |
|---|---|
| út | dag |
| stutt | in |
| Træla | dal |
| føðingar | ferð |
| morg | vatn |
| Kambs | ligt |



***Set orðini rætt saman*** **og skriva tað** ***samansetta orðið!*** **Minst til at skriva** ***sernøvn við stórum!***

| | | | |
|---|---|---|---|
| føðing | + | dagur | ________________ |
| trælur | + | vatn | ________________ |
| kambur | + | dalur | ________________ |
| fuglur | + | fjørður | ________________ |
| út | + | ferð | ________________ |

**Finn í fyrisøgnini** ***tað øvuta*** **av hesum orðum og skriva tað tvær ferðir!**

| | | | |
|---|---|---|---|
| keðiligt | ________________ | ________________ | (2) |
| oman | ________________ | ________________ | (4) |
| inn | ________________ | ________________ | (5) |
| stutt | ________________ | ________________ | (6) |
| illa | ________________ | ________________ | (7) |

**Finn orð í fyrisøgnini, sum týða** ***tað sama!***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kæra | ________________ | ________________ | (1) |
| gleðiligt | ________________ | ________________ | (2) |
| frætta | ________________ | ________________ | (3) |
| gonguferð | ________________ | ________________ | (4) |
| fortelja | ________________ | ________________ | (7) |





**Set orðini á rætt stað í talvuna og skriva orðið rætt á regluna!**

meg einaferð fyrr stuttligt eg brævið hevði børnini

**Set x í røttu puntarnar fyri hvørt orðið!**

| navnorð | eintal | fleirtal | kallkyn | kvennk. | hvørkik. |
|---|---|---|---|---|---|
| bræv | | | | | |
| vatn | | | | | |
| útferð | | | | | |
| bussur | | | | | |
| børnini | | | | | |
| dalur | | | | | |
| skúli | | | | | |
| dagur | | | | | |



# Brævbjálvin

**Frágreiðing:**
Tá ið tú sendir eitt bræv við postinum, skalt tú skriva ***fornavn* og *eftirnavn* á *móttakaranum* ovast á brævbjálvan. So skrivar tú møguligt *gøtunavn* og møguligt *gøtunummar* og niðast *postnummar* og *bygd/bý*.**

Navnið á *sendaranum* verður skrivað *aftanfyri* á brævbjálvanum!
Dømi:




**Her eru *tilskriftirnar* hjá Beintu, Høgnari, Honnu og Ásu:**

Beinta Hanusardóttir
Høvdagøtu
700 Klaksvík

Høgnar Ragnarsson
Magnusargøtu
900 Vági

Ása Høgnadóttir
440 Haldórsvík

Hanna Jakobsen
Mørkini
530 Fuglafirði

Hjálp Ásu at skriva uttan á brævbjálvan. Hon hevur skrivað Honnu bræv!



Hjálp Høgnari at skriva uttan á brævbjálvan. Hann hevur skrivað Beintu bræv!



# Ymisk brøv




**Tú fært tveir minuttir til hvørja av hesum uppgávunum!**

Ger hugarok! – Savna tær orð!

**Tú skalt skriva** *bræv* til *eitt vinfólk*, sum býr í eini *aðrari bygd*. **Hvat skalt tú taka fyri í brævinum?**



**Tú skalt skriva eitt** ***jólakort*****!**

**Tú skalt skriva eitt** ***innbjóðingarkort*** **til eina** ***floksveitslu*****!**



# Skrínið

Í skríninum taka vit saman um tað, sum vit hava lært í hesum partinum.

Vit hava arbeitt við:

- at finna *umsøgn, grundorð* og seta *komma* og *punktum* í ein tekst
- at kenna *sernøvn* frá *felagsnøvnum,* t.e. vanligum navnorðum
- at skriva *uttan á* ein *brævbjálva*
- orðum við *i* og *y*

**Fyrisøgn**

Vági, 2. oktober 2____

Góða Beinta!

Seinasta leygardag var eg í Havn og hugdi at fótbólti. VB spældi móti B36. Tað var ein spennandi dagur hjá okkum vágbingum, tí vann VB, vórðu teir føroyameistarar.

Vit fóru til Tvøroyrar tíðliga leygarmorgunin við bussinum. Hann steðgaði í øllum bygdunum. Fyrst í Porkeri, so í Hovi og í Øravík. At enda sóu vit Trongisvág og Tvøroyri.

Smyril lá við bryggju á Krambatanga. Eg kvikaði mær úr bussinum, tí at eg vildi verða vísur í at sleppa við.

Veðrið norður var av tí allarbesta. Meðan vit sigldu fram við Lítlu Dímun og Stóru Dímun, sungu vit VB-sangin. Ferðin norður gekk væl, og skjótt høvdu vit lagt bæði Skúvoynna, Sandoynna og Nólsoynna aftur um okkum.

Vit vóru á Havnini kl. 12.00 og gingu skrúðgongu niðan í Gundadal, har sum nógv fólk vóru komin saman.

Dysturin var eisini spennandi. Eg haldi, eg havi ikki verið so spentur í lívinum.VB vann 2-1, og tá ið dómarin bríkslaði dystin av, runnu vit inn á vøllin at heiðra spælararnar.

Um kvøldið vóru øll boðin í veitslu í ítróttarhøllini í Vági. Hetta var ein dagur, eg seint fari at gloyma.

Heilsan
Høgnar

**Frágreiðing:**

Øll *sernøvn* verða skrivað *við stórum*. Talan kann til dømis vera um *staðanøvn* (t.e. navn á býi, bygd, landi, fjalli, havi o.ø.), *fólkanøvn*, *skipanøvn* ella *djóra(keli)nøvn* (Snar, Flekka, Svarta...)

*Felagsnøvn* (navnorð), so sum klaksvíkingur, sumbingur, hvalbingur og føroyingur, verða skrivað *við lítlum*. Eisini orð sum ketta, hundur, kalvi og toskur eru *vanlig navnorð* og verða skrivað *við lítlum*.

Í fyrisøgnini eru mong *sernøvn*. Har eru 14 ymisk *staðanøvn* – nøvn á býum, bygdum, oyggjum og støðum í Føroyum, 2 *fólkanøvn* og 1 *skipanavn*.

Minst til, at *sernøvn* verða skrivað *við stórum*!

**Skriva *sernøvnini* úr fyrisøgnini her:**

*Staðanøvn*:

__________ __________ __________

__________ __________ __________

__________ __________ __________

__________ __________ __________

__________ __________

*Fólkanøvn* og *skipanavn*:

__________ __________ __________

**Frágreiðing:**
*Umsøgn* er *sagnorð*, sum stendur í *nútíð* ella *tátíð*.
*Grundorð* er *navnorð* ella eitt orð, ið stendur *í staðin fyri navnorð. Grundorðið* er tann, ið *fremur sagnorðið.*
Spyr *hvør,* so finnur tú *grundorðið*!
Minst eisini til *kommaorðini* á bls. 33

Tú nýtir hesi tekn:
*Umsøgn: o* *Grundorð: x*

**Finn *umsøgn* og *grundorð* í setningunum og set *komma*!**

Seinasta leygardag var eg í Havn.

Tað var ein spennandi dagur hjá okkum vágbingum.

Vit fóru til Tvøroyrar tíðliga leygarmorgunin.

Smyril lá við bryggju á Krambatanga.

Meðan vit sigldu fram við Lítlu Dímun sungu vit VB-sangin.

Ferðin norður gekk væl og skjótt høvdu vit lagt Sandoynna afturum.

Vágbingar vórðu føroyameistarar um teir vunnu.

Eg vónaði at VB fór at vinna men teir í B36 vóru eisini góðir.

Tá ið vit komu til Vágs fóru øll í veitslu í ítróttarhøllini.

Hetta var ein góður dagur sum eg seint fari at gloyma.

**Set rætta orðið í botnin í skríninum!**

1. Talið í hesum kassanum sigur, hvønn setning niðanfyri tú skalt hyggja eftir!
2. Orðið í hesum kassanum sigur, hvat orð í setninginum tú skalt nýta!
3. Tú skalt skriva rætta orðið í talvuna í hesum kassanum – og allan setningin í næsta kassan!

| 1 | 2 | 3 | 4 |
|---|---|---|---|
| **sernavn** | **sagnorð** | **lýsingarorð** | **navnorð** |
| | | | |

1. Høgnar fer at hyggja at fótbólti.
2. Hann er ógvuliga spentur.
3. Hetta var ein stórur dagur hjá vágbingum.
4. Ein lítil drongur fór einsamallur til Havnar.

***Skriva allan setningin* her og set *umsøgn* og *grundorð!***

**Frágeiðing:**
*Punktum* seta vit eftir ein setning, sum *kann standa einsamallur* ella *gevur fullgóða meining.*

Set 7 *punktum* í tekstin – og minst til at skriva *við stórum eftir punktum*!

Høgnar hevur skrivað Beintu bræv hann hevur sagt henni frá frálíku ferðini í Havn leygardagin hann veit ikki, um hon hevur áhuga fyri fótbólti, men hon spælir hondbólt við Stjørnuni úr Klaksvík í fjør vetur var liðið hjá henni í Vági og spældi móti VB-gentunum Høgnar sá dystin hann helt við báðum liðum tíbetur endaði dysturin við javnleiki

**Finn orð úr fyrisøgnini, sum týða tað sama, og skriva tey tvær ferðir!**

| | | | |
|---|---|---|---|
| leikti | ____________ | ____________ | (1) |
| sigraði | ____________ | ____________ | (3) |
| blivu | ____________ | ____________ | (3) |
| árla | ____________ | ____________ | (4) |
| seinast | ____________ | ____________ | (6) |
| kei | ____________ | ____________ | (7) |
| skundaði | ____________ | ____________ | (7) |
| allarfagrasta | ____________ | ____________ | (9) |
| brátt | ____________ | ____________ | (11) |
| floytaði | ____________ | ____________ | (16) |




**Loys orðagátuna niðanfyri og set svarið í „urið“ omanfyri, so sum tølini vísa!**

1 - 3: sæst á luftini
4: sjálvljóð
6 - 9: tátíð av *at skera*
8 - 10: dreingjanavn

2 - 3: tátíð av *at ala*
4 - 8: vera góð/ur við
7 - 9: ílat
1 - 10: dámar sera væl hita

# Vegleiðing

**Síða 8-10**

Prátað verður um samansett navnorð, og hvussu navnorð verða sett saman. Næmingarnir hava ikki enn havt um føllini og heldur ikki um stovnin í navnorðum, men av tí at teir hoyra, hvussu orðini verða sett saman, ber kortini til at práta um hetta fyribrigdið. Fyrisøgnin verður lisin. Annaðhvørt lesur lærarin hana fyri næmingunum, ella lesa næmingarnir hana sjálvir. Teir skulu so finna tey samansettu navnorðini í fyrisøgnini.

Niðasta uppgáva á síðu 8 er ein fyrireikingaruppgáva til fyrisøgnina, har sum næmingarnir finna orð í fyrisøgnini, ið týða tað øvuta. Dentur verður lagdur á, at orðini verða rætt stavað.

Á síðu 9 er ein útfyllingaruppgáva. Lærarin eigur at minna næmingarnar á at nýta fyrisagnartekstin.

Í seinnu uppgávuni á síðu 9 skulu næmingarnir gera tvey navnorð til eitt annað, samansett navnorð og so seta hesi navnorðini í bókstavarað í talvuna á síðu 10. Best er, at næmingarnir duga bókstavaraðið uttanat – men til ber eisini at vísa á bls. 12 í EG SKRIVI 1, har sum bókstavaraðið stendur.

**Síða 11-15**

Á síðu 11 og 12 skulu næmingarnir arbeiða við *sagnorðunum fer og ger* og *navnorðunum ferð og gerð.*

Orðini í orðagátuni eru hesi: sólja, summar, vár, jól, lundi, Noreg og Tórshavn.

Fyrisøgnin snýr seg serliga um orðini fer, ger, ferð og gerð, at tey verða rætt stavað. Fyrisøgnin er heldur long at skriva í einum. Til ber annaðhvørt at skriva hana í tveimum ella at skriva part av henni.

Uppgávurnar til fyrisøgnina eru serliga sagnorðauppgávur. Aftur her eigur at verða lagdur dentur á at fáa næmingarnar at hugsa um, *at samband er ímillum tátíðarending og nútíðarending*. Í uppgávuni á síðu 14 síggja næmingarnir, at summi sagnorð hava *ljóðskifti* í stovninum og tí enda við *-ur í nútíð, hóast* tey enda við *-di* í tátíð. Fyri betur at kunna skilja ljóðskiftið er uppgávan bygd soleiðis upp, at hon fyrst vísir øll sjálvljóðini / tvíljóðini. Síðan skulu næmingarnir seta prikk undir sjálvljóðini / tvíljóðini í ávísum orðum, ið standa í navnhátti, og skulu so skriva tey í tátíð. Tá ið hetta er gjørt, skulu teir aftur seta prikk undir sjálvljóðini í tátíð og hyggja eftir, um sjálvljóðini / tvíljóðini eru broytt frá navnhátti til tátíð. Uppgávan er soleiðis gjørd, so at næmingarnir betur skilja, at ljóðskiftið er tað sama sum, at sjálvljóðið / tvíljóðið broytist. Sjálvandi er neyðugt, *at næmingurin kennir fyribrigdið sjálvljóð/tvíljóð,* so at hann yvirhøvur kann geva sær far um ljóðskifti í orðstovninum.

**Síða 16-20**

Skrínið tekur saman um tað, sum næmingarnir hava arbeitt við, eisini í teirri undanfarnu bókini.

Næmingarnir eiga nú helst at kenna orðaflokkarnar navnorð, sagnorð og lýsingarorð.

Í uppgávuni niðast á síðu 16 og í uppgávuni á síðu 17 skulu næmingarnir arbeiða við sagnorðabending. Fyri fyrst skulu næmingarnir bara skriva sagnorðini í navnhátti og í tátíð, so at teir leggja sær í geyma, at tað hevur nógv at siga, hvussu tátíðarendingin er – til tess at kenna nútíðarendingina. Á síðu 17 skulu orðini verða flokkað eftir tátíðarending, og í seinnu uppgávuni skulu næmingarnir skriva sagnorðini í nútíð á tær tómu reglurnar. Lærarin eigur at minna næmingarnar á at hugsa um tátíðarendingina, *áðrenn* teir skriva orðið í nútíð.

Fyrisøgnin á síðu 18 viðger m.a. nútíðarendingarnar.

Lærarin eigur at minna næmingarnar á at nýta fyrisagnartekstin, tá ið teir loysa fyri-

reikingaruppgávurnar, og at stava orðini rætt.

Fyrisøgnin eigur at verða skrivað á ymiskum torleikastigum.

Eykauppgávan er óheft at hinum uppgávunum í Skríninum. Loysunarorðið í orðagátuni niðast á bls. 20 er: ljósastaki.

**Síða 21-25**

Í hesum partinum verður farið undir *sernøvnini*. Dentur eigur beinanvegin at verða lagdur á, at sernøvn verða skrivað við stórum bókstavi. Áðrenn uppgávurnar verða loystar, ber til at spæla spælið „genta, drongur" (sí *Hugskot til spæl og ymiskt virksemi, tá ið arbeitt verður við mállæruni* í EG SKRIVI 1).

Í fyrisøgnini eru sernøvn av ymiskum slagi, so at næmingarnir tess betur skilja, hvørji navnorð kunnu vera sernøvn.

Uppgávurnar á síðu 22 eru venjingaruppgávur til sernøvn. Minn næmingarnar á at skriva sernøvnini við stórum.

Uppgávan niðast á síðu 22 kann verða gjørd sum einstaklingsuppgáva, men til ber eisini at gera hana sum bólkauppgávu. Tíðarásetingin kann sjálvandi verða broytt.

Atlasuppgávan á síðu 23 venur næmingarnar at arbeiða við uppslagsbókum, sum eigur at verða ein partur av undirvísingini.

Uppgávan á síðu 24 hevur loysunarorð og er tí sjálvrættandi. Í uppgávuni „Finn fjaldar bygdir" á síðu 25 skulu næmingarnir leita eftir bygdum tvørturum og niðureftir. Minn næmingarnar á at skriva bygdanøvnini við stórum bókstavi. Bygdirnar skulu verða skrivaðar eftir bókstavaraðnum, tí hevði verið gott, um næmingarnir fyrst skrivaðu bygdirnar, ið byrja við S og H, á eitt pappír fyri seg – tí tær eru so nógvar – og síðani skrivaðu tær inn í næmingaheftið eftir bókstavaraðnum.

**Síða 26-28**

Fyrisøgnin verður fyrireikað sum vanligt. Útfyllingaruppgávan á síðu 27 er lættari at loysa, um næmingarnir hyggja í fyrisagnartekstin. Seinna uppgávan er ein rættstavingaruppgáva. Lærarin eigur at fáa næmingarnar at sláa tey orðini upp, ið teir ikki duga at stava, heldur enn bara at gita. Uppgávan er sjálvrættandi.

Uppgávurnar á síðu 28 eru slíkar uppgávur, ið næmingarnir gera samstundis í ávísa tíð. Ætlanin við uppgávunum er at fáa næmingarnar at hugsa um, at tað teir gera (allar gerðir og rørslur) eru sagnorð. Samstundis fáa teir helst eisini eyga á, at tá ið ‚eg' fremur sagnorðið, endar sagnorðið við *-i*.

**Síða 29-33**

Í hesum partinum finna næmingarnir umsøgn og grundorð og seta komma og punktum í ein tekst.

Á síðu 29 skulu næmingarnir aftan á, at teir hava sett punktum í tekstin, seta orðini framman fyri punktum inn í eina orðagátu. Uppgávan er gjørd soleiðis, bæði so at hon verður meira spennandi, men eisini so at næmingarnir á henda hátt kunnu nýta orðagátuna sum hjálparamboð, um teir ivast í onkrum punktum.

Á síðu 30 er ein uppgáva, har sum næminganir skulu hyggja eftir, um orðið er sagnorð í nútíð ella tátíð ella ikki. Hetta verður gjørt, so at næmingarnar fyrst og fremst skulu kunna kenna sagnorð frá øðrum orðaflokkum – og eisini at kanna eftir, um sagnorðið stendur í nútíð ella tátíð. Duga teir tað, er eisini lættari hjá teimum at finna umsagnirnar, tí á hesum aldursstigi er nóg mikið hjá næmingunum at vita, at *umsøgn er sagnorð í nútíð ella tátíð*. Seinni læra teir so um samansettar umsagnir, har sum seinni umsagnarparturin er lýsingarháttur í tátíð.

**Síða 34-37**

Fyrisøgnin verður fyrireikað sum áður. Umframt at skriva fyrisøgnina skulu næmingarnir seta punktum í tekstin, finna umsøgn og grundorð og seta komma. Teir verða fyrst bidnir um at strika undir sagnorðini í nútíð og tátíð. Bæði sagnorðatalið og reglurnar, har sum hesi sagnorðini standa, fáa næm-

ingarnir at vita. Hetta verður gjørt, so at uppgávan verður tað lættari. Tá ið næmingarnir hava sett striku undir hesi sagnorðini, hava teir samstundis funnið umsagnirnar. Á hendi hátt haldi eg, at næmingarnir lættari kunnu leggja sær í geyma, at umsøgnin er sagnorð í nútíð ella tátíð.

**Síða 38-39**

Á hesum síðunum skulu næmingarnir skriva uttan á brævbjálvar. Halda næmingar og lærari, at neyðugt er við meira venjing, ber til at skriva uttan á veruligar brævbjálvar ella lata næmingarnar sjálvar gera sær nakrar brævbjálvar at skriva á.

**Síða 40**

Her er aftur ein uppgáva at savna saman orð. Til ber at seta tíð á hvørja uppgávu og møguliga práta um orðini ímillum hvørja uppgávu. Eisini ber til at lata næmingarnar arbeiða í bólki við hesum uppgávum og møguliga eisini lata teir sleppa at skriva eitt bræv, eitt jólakort ella eina innbjóðing. Um hetta verður gjørt, kunnu næmingarnir royna at prýða brævið, kortið ella innbjóðingina.

**Síða 41-45**

Fyrisøgnin tekur sær eina helst av sernøvnum, og í uppgávuni á síðu 42 skulu næmingarnir finna sernøvnini í fyrisøgnini. Fyrisøgnin er ov long at skriva í einum, men til ber annaðhvørt at skriva hana í tveimum – ella bara skriva ein part av fyrisøgnini. Fyrisøgnin eigur at verða skrivað á ymiskum torleikastigum.

Í uppgávuni á síðu 44 skulu næmingarnir finna ávíst orð úr einum ávísum setningi. 1-talið týðir, at næmingurin skal hyggja eftir tí 1. setninginum – sernavn týðir, at næmingurin skal hyggja eftir sernavninum í hesum setningi og skriva tað niðast í talvuna.

Loysunarorðið í orðagátuni á blaðsíðu 45 er: sólelskari.

ISBN 978-99918-0-353-1

9 789991 803531

NÁM